Røða, sum Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, helt í sambandi við, at Føroyar fingu atlimaskap í Heimsheilsustovninum, WHO.

**Háttvirdi aðalstjóri, ráðharrar og umboðsfólk**

Vegna føroysku stjórnina fari eg við hesum at takka tykkum øllum so hjartaliga fyri at hava viðgjørt umsóknina um føroyskan atlimaskap í Heimsheilsustovninum og gingið umsóknini á møti við vælvild.

Føroyar eru eitt lítið oyggjaland við bara 53.000 fólkum og eru ein sjálvstýrandi partur í danska kongaríkinum. Vit hava  okkara egna heilsu- og sjúkrahúsverk, sum í dygd og førleikum er á altjóða stigi. Eisini í granskingarhøpi eru Føroyar frammarlaga á heilsuøkinum.

Fyri framhaldandi menning innan okkara heilsuøkið, gransking og fyri Føroyar sum tjóð, er tað týdningarmikið, at vit hava atgongd til teir pallar, har heilsa, sjúkufyribyrging og sjúkuviðgerð eins og gransking innan hesi øki verða lýst, viðgjørd og samskipað í altjóða høpi.

Tann størsti og mest tignarligi av hesum pallum er Heimsheilsustovnurin. Eisini er Heimsheilsustovnurin tann týdningarmesti felagsskapurin at vera partur av, tá tað snýr seg um heilsu, heilsukreppur og kreppustýring í tí sambandi.

Við atlimaskapinum fáa Føroyar nú atgongd til virðismikla vitan og gransking á heilsuøkinum, og vit fáa møguleika at knýta virðismikil sambond og samstørv við onnur lond innan Heimsheilsustovnin.

Vit liva í eini tíð við stórum avbjóðingum í heimshøpi, ikki minst við Covid-19 farsóttini.

Føroyar hava verið í fremstu røð, tá tað ræður um at menna kanningarhættir, munadygga smittusporing, sóttarhald, koppseting og at basa Covid-19 smittuni. Undir farsóttini hava vit fylgt vegleiðingunum frá Heimsheilsustovninum. Vit eru sloppin væl heilsuliga, samfelagsliga og búskaparliga frá heimsfarsóttini.

Enn einaferð, hjartans takk fyri atlimaskapin. Vit ætla okkum at fara inn í hetta samstarvið við opnum sinni, ídni og ábyrgd.

Takk fyri.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • www.hmr.fo • hmr@hmr.fo